Kári Johannesen:

# Setti virksemi í gongd í fátækum landi

**Hjartalag og hjálparhugur kunnu seta virksemi í gongd í fátækum landi. Hetta er søgan um besløgini, sum sett verða á aliringar, eitt prógv um. Søgan er ókend millum tey flestu. Hetta er ein søga um hjálp til sjálvhjálp. Men hetta er eisini ein søga um mannin, Kára Johannesen, sála, sum átti KJ-Hydraulik, men sum noyddist at gevast í góðum árum. Kári gav nevniliga maskinurnar, sum Hydro Tech hevði brúkt til at gera hesi besløgini, til ein mann í Rumenia, og haðani hevur alivinnan í Føroyum og aðrastaðni síðan keypt besløg**

SJÁLVHJÁLP

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

KJ-Hydraulik hevur verið við á øllum teimum undanfarnu fiskivinnustevnunum, sum North Atlantic Fish Fair hevur skipað fyri, og soleiðis verður eisini hesaferð, nú fjórða stevnan í røðini verður hildin hósdagin, fríggjadagin og leygardagin í komandi viku.

Ólavur A. Olsen, stjóri, sigur, at felagið gjørdi nógv burtur úr, tá stevnan varð hildin á fyrsta sinni á havnalagnum hjá Runavíkar havn.

- Ikki minst tann parturin, sum Hydro Tech á Eiði tá stóð fyri innan alivinnuna, var væl umboðaður, eitt nú við bátum til alivinnuna, besløgum til aliringar og øðrum.

## Hørð kapping

Søgan aftanfyri Hydro Tech, sum KJ var partur av og sum seinni burtur av er lagt undir virksemið hjá felagnum á Kambsdali, leiðir stjóran, Ólav A. Olsen, til eina sólskinssøgu, sum at kalla ikki hevur verið frammi í Føroyum áður.

Hetta er ein rættiliga fitt og hugnalig søga sum lýsir, hvussu føroyingar á ein øðrvísi hátt og við góðum úrsliti kunnu veita hjálp og stuðla uppundir, har ein fløvandi hond er kærkomin.

Undirritaði, sum skrivar hesa greinina, minnist onkra fiskivinnustevnu uttanlands, har Hydro Tech serliga bjóðaði seg fram við besløgum til aliringar, sum felagið á Eiði gjørdi.

- Hugskotið við at gera hesi besløg var gott. Tey skulu verða ógvuliga neyv og sita væl um aliringin uttan at belasta hann. Men tað var tungt at fáa hesa framleiðslu at geva pening, tí kappingin var hørð. Vit eru framvegis veitarar av hesum besløgum til alivinnuna í Føroyum og øðrum londum uttanum okkum, eitt nú í Íslandi og Skotlandi, men nú verða tey ikki longur framleidd í Føroyum, sigur stjórin í KJ-Hydraulik.

## Gav maskinurnar

At hesi besløg nú eru framleidd í Rumenia seinastu árini, er ein søga fyri seg – og ein søga, sum Ólavur heldur sigur nakað um tað hjartalag, hjálparhug og framskygni, ið Kári Johannesen, sáli, sum átti alt KJ-Hydraulik, hevði.

Áðrenn vit fara víðari, kunnu vit skoyta uppí, at KJ í dag eisini er veitari av komplettum aliringum.

- Vit umboða og selja lidnar aliringar og tað einasta, sum ikki er við, er sjálv nótin, sigur hann.

Sólskinssøgan er, at Kári Johannesen var ein av teimum, sum plagdi at koyra klæðir niður til Rumenia, og eina av hesum ferðum gjørdi hann saman við øðrum lutfalsliga stutt, áðrenn hann doyði av sjúku.

- Í einum fátækum parti av landinum, sum var rakt av herviligum arbeiðsloysi, møtti hann manninum, Karl Staotz, sum eins og Kári sjálvur hoyrdi til brøðrasamkomuna. Karl var trúgvandi. Hann var maskinsmiður, og teir gjørdust ógvuliga væl.

Heimaftur komin av hesi ferðini, gjørdi Kári Johannesen ikki matari enn at taka maskinurnar niður í smiðjubygninginum á Eiði, koyra tær upp í ein lastbil



*Søgan um, tá Kári Johannesen gav maskinurnar, sum stóðu í bygninginum hjá Hydro Tech á Eiði, til ein rumenara í fátækum landsluti, er ein sólskinssøga, sum sigur nakað um hjartalagið hjá manninum, ið átti KJ-Hydraulik*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*